Forvitnislig vitjan:

Seismiskt skip úr Houston á Havnina

Sunnumorgunin kemur amerikanska seismiska kanningarskipið "Patrick E. Haggerty" á Havnina og fer tað at steðga her í umar 2-3 dagar. Hetta er fyrstu ferð, at eitt slíkt skip vitjar føroyska havn. Endamálið við vitjanini er at vísa áhugaðum føroyingum, hvussu eitt slíkt skip er útgjørt og hvussu tað arbeiðir við seismiskum kanningum.

Talan er um eina ikki almenna vitjan og hevur hon sjálvandi samband við tá nógva prátið um at leita eftir olju og gassi í føroyska undirgrundini.

Í einum tíðindaskrivi í sambandi við vitjanina sigur felagið "Faroe Offshore International" frá, at endamálið við vitjanini er at vísa og útbúgva bæði næmingar og onnur, sum hava áhuga fyri framtíðar seismiskum arbeiði í Føroyum, hvat hetta arbeiðið tevnir um og hvussu tað verður gjørt.

Skulanæmingar við

Ætlanin er at fara ein tur við skipinum og har vísa fram útgerðina. Næmingar frá teknisku skulunum, maskinskulum, sjómansskula og handilsskúlum fáa høvi at vera við skipinum umframt onnur áhugað.

Danial Poulsen frá Faroe Offshore International, sum hevur tikið stig til hesa vitjan sigur, at endamálið er sjálvandi eisini at geva føroyingum eina fatan av, hvat seismiskt arbeiði er og ber í sær og at birta upp undir áhugan og eisini tjókið um, hvussu føroyskar fyritøkur kunna vera við í tí arbeiðinum, sum hevur til tann seismiska partin av kanningum í sambandi við eina kanningi olju.

Verið her áður

Tað er stóra amerikanska felagið Halliburton Geophysical Services, ið eigur skipið. Felagið hevur bústað í oljubýnum Houston í USA og virkar annars kring allan heimin.

Skipið, sum kemur á Havnina tíðliga sunnumorgunin, hevur gjørt seismiskar kanningar nógva staðni í heimunum, men tað er ikki ókent heldur um okkara leiðir. Tað var nevniliga hetta skipið, sum í 1992 gjørdi nákrar seismiskar kanningar á føroyskum øki fyri franska felagið Total Oil Marine.

Úrslitið av hesum kanningum er um at vera klárt.

Endamálið við kanningunum í fjør var at samanbera løgmi føroysku megin Hetlandsrenningina við tey breytini megin renningina, sum eru kannað og har menn vita at olja finst í stórum nøgdum.

Ætlanin er at seismiska skipið skal vera í Føroyum í tveir dagar, men er vinki um tað, so verður tað her í tríggjar dagar.

Umboðað hjá Halliburton í Føroyum er Smyril Line.

jan

Her stiggja vit fyrverandi [illegible] um norðmenn hava umbygt til at gera seismiskar kanningar.

Spurnisngurin um eismiskar kanningar eru nógv framma í Føroyum í hesum døgum. Sunnudagin vitjar eitt av teimum best útgjørdu seismiska skipunum í heiminum: Havnina. Harumframt er ein av teimum kendastu sertrøðingunum í seismiskum kanningum, Judy Nesch á vitjan í Føroyum. Her sæst hon á Tíðindablaðnum Sosialinum saman við Claus Reistrup frá Landsskattaverkinum. Tey hava eina okkalloða luftkanon, sum verður brukt til at skjóta seismisk ljóð. Mynd: kalmar

Øll popporkestrini til Havnar at spæla

4 ella 5 leygardagar í mai mánað frá kl. 19-22 skeppa popporkestur úr øllum Føroyum at royna seg á pallí í Sjónleikarhúsinum

Havnar Sjónleikarfelag fylti 75 ár hin 10. febr. í ár. Í hesum sambandi hevur Sjónleikarhúsið havt nógv vitjanir av ymiskum slagi bæði av sjónleiki og øðrum, og er ætlanin at halda fram.

Ungdómskonsertirnar í mai mánað eru somuleiðis ein liður í tíðindingardagshaldinum hjá felagnum.

Ætlanin er at geva ungum og eisini ópallfroyndum orkestrum høvi til at royna seg á pallí. Felagið hevur otta tónleikarar og tónleikabólkar við í sjónleikunum, og er vitandi um, at nógvir tónleikabólkar hava lítlar møguleikar til at royna seg á pallí og til at hava áhoyrarar. Sera umráðandi er at hava áhoyrarar, skal ein bólkur koa viðari við sínum tónleiki og gerast kendur millum fólk.

Bólkarnir skulu tekna seg í Sjónleikarhúsinum í norðara enda í mánadagin og týsdagin hin 5. og 6. apríl kl. 13-16. Eisini ber til at ringja á tlf. 11132 [illegible] verður fólk, sum kann [illegible] trógrent.

Tá hugur er at tekna lutvísa, verða skrantrar lagdar at fara at vísa, hvørji ov kostir fara at spæla tey ymsu [illegible] vandi. Kon[illegible] [illegible] at vera [illegible] at blæsum og útvarpi.

Billettprísurin til [illegible] [illegible] verður [illegible]